Til Løgtingsformannin

Á løgtingi 21. oktober 2021

**Um at seta kanningarstjóra**

- **At kanna lógargrundarlagið, lógar- og reglutulkingar og fyrisitingarligu avgerðirnar í føroyskari fiskivinnufyrisiting viðvíkjandi tilluting og útluting av fiskirættindum síðani 2010, og harundir fyrisitingarligar avgerðir um ítøkiligar útlutingar av fiskirættindum frá 2018 til og við 2021**

Vísandi til løgtingslóg um stýrisskipan Føroya, §38, stk. 2, krevja undirritaðu tingfólk, at løgtingsformaðurin setur kanningarstjóra at kanna, lýsa og gera niðurstøður um tær týðandi avgerðirnar í føroyskari fiskivinnufyrisiting síðani 2010 viðvíkjandi tilluting og útluting av fiskirættindum sum Føroyar hava ræði á.

Kanningin, lýsingin og niðurstøðurnar skulu leggja dent á lógargrundarlagið, og um avgerðir hjá landsstýrisfólki fyrisitingarliga eru farnar fram á lógligan og fullgóðan hátt sambært viðkomandi lógum og reglum, harundir eftir lóg um ábyrgd landsstýrismanna og fyrisitingarligum meginkrøvum um lógar- og reglutulking, sakligheit, grundgeving, líkareglu, proporsjónaliteti, partshoyring, notatskyldu, fult upplýst mál, skjalfestingar, rættartrygd og kunning til borgaran, viging av týðandi og viðkomandi upplýsingum, týðandi atlitum til virðir landsins og gagn almenningsins v.m.

Kanningin, lýsingin og niðurstøðurnar skulu í minsta lagi lýsast í trimum pørtum og við ávegis niðurstøðum, ið verða latnar Løgtinginum og almannakunngjørdar so hvørt:

1. Hvussu hevur fyrisitingarliga viðgerðin gingið fyri seg, og hevur fyrisitingin hjá landsstýrismanninum (harundir lógar, kunnngerðar- og reglutulking) verið lóglig, fullgóð, saklig og rættartrygg mótvegis borgarum og almennum áhugamálum í øllum týðandi avgerðum um útlutingar av fiskirættindum í 2020 og í 2021 (útlutingar til skipabólkar, útlutingar til vinnuligar royndir og verkætlanir, harundir ískoytiskvotur og til ítøkiligt skipakeyp)? Hevur talan verið um valdsreingjan (maktfordrejning) hjá landsstýrismanninum í sambandi við avgerðir um útluting av fiskirættindum?

   Herundir m.a.:

- Uppfyltu umsøkjarar, ið fingu tillutað rættindi, tey høvuðskrøv, ið vórðu sett í lóg, kunngerð, metingarskjølum o.ø.?
- Uppfyltu umsøkjarar, ið vórðu vrakaðir, tey høvuðskrøv, ið vórðu sett í lóg, kunngerð, metingarskjølum o.ø.?
- Hvørjar vóru ítøkiligu heimildirnar, hvørji vóru tilmælini frá umsitingini, fylgdi landsstýrismaðurin tilmælunum, ávaraði umsitingin landsstýrismannin – og við hvørjari lógligari og sakligari grundgeving og skjalfesting tók landsstýrismaðurin avgerð?

25 OKT. 2021
LØGTINGIÐ
J.nr.: 1111-20210001
1

- Legði landsstýrismaðurin aðrar treytir inn í viðgerðina, enn tær, ið vórðu lýstar í lóg, kunngerð, metingarskjølum, og vóru tær sakligar og eftir líkareglu, proporsjónaliteti, partshoyring, veruligum umstøðum o.ø. fyrisitingarligum meginreglum?
- Vóru avgerðir um innlit, partsinnlit, partshoyring, veruligar umstøður, kæruvegleiðing og kæruviðgerð, sakligar og grundaðar?

  Biðið verður um, at niðurstøða verður gjørd um hetta og latin Løgtinginum og almannakunngjørd í seinasta lagi 1. mai 2022.

2. Hvussu hevur fyrisitingarliga viðgerðin gingið fyri seg, og hevur fyrisitingin hjá landsstýrismanninum (harundir lógar, kunnngerðar- og reglutulking) verið lóglig, fullgóð og rættartrygg mótvegis borgarum og almennum áhugamálum og virðum í øllum týðandi avgerðum um kvotutillutingar í 2018 og 2019 (herundir útlutingar til skipabólkar og menningarkvotur). Hevur talan verið um valdsreingjan (maktfordrejning) hjá landsstýrismanninum í sambandi við avgerðir um útluting av fiskirættindum?

   Herundir m.a.:

- Uppfyltu umsøkjarar, ið fingu tillutað rættindi, tey høvuðskrøv, ið vórðu sett í lóg, kunngerð, metingarskjølum o.ø.?
- Uppfyltu umsøkjarar, ið vórðu vrakaðir, tey høvuðskrøv, ið vórðu sett í lóg, kunngerð, metingarskjølum o.ø.?
- Hvørjar vóru ítøkiligu heimildirnar, hvørji vóru tilmælini frá umsitingini, fylgdi landsstýrismaðurin tilmælunum, ávaraði umsitingin landsstýrismannin – og við hvørjari lógligari og sakligari grundgeving og skjalfesting tók landsstýrismaðurin avgerð?
- Legði landsstýrismaðurin aðrar treytir inn í viðgerðina, enn tær, ið vórðu lýstar í lóg, kunngerð, metingarskjølum, og vóru tær sakligar og eftir líkareglu, proporsjónaliteti, partshoyring, veruligum umstøðum o.ø. fyrisitingarligum meginreglum?
- Vóru avgerðir um innlit, partsinnlit, partshoyring, veruligar umstøður, kæruvegleiðing og kæruviðgerð, sakligar og grundaðar?

  Biðið verður um, at niðurstøða verður gjørd um hetta og latin Løgtinginum og almannakunngjørd í seinasta lagi 1. mai 2022.

3. Hvussu hevur fyrisitingarliga viðgerðin gingið fyri seg, og hevur fyrisitingin verið lóglig, fullgóð og rættartrygg mótvegis borgarum og almennum áhugamálum og virðum í øllum týðandi avgerðum um útluting av fiskirættindum frá 2010 til 2018 undir táverandi lóg um vinnuligan fiskiskap – harundir tulking, viðgerð og avgerð um heimild, líkareglu viðvíkjandi veiðiloyvi, fiskiloyvi og fiskirættindum hjá teimum, ið lógin og skipanirnar fevndu um? Hevur talan verið um valdsreingjan (maktfordrejning) hjá landsstýrisfólki í sambandi við avgerðir um útluting av fiskirættindum?

   Harundir m.a. hesir spurnginar:

- Varð skipan við sokallaðum fyribils og avmarkaðum rættindum viðgjørd í fyrisitingini, og hvør var tulkingin og niðurstøðan?
- Hevði landsstýrismaðurin lógarheimild, og hvørji vóru tey sakligu atlitini at knýta fyribils tillutaði rættindi at fiskiførum, sum høvdu veiðiloyvi til annan fiskiskap enn uppsjóvarfiskiskap?
- Hevði landsstýrismaðurin lógarheimild og hvørji vóru tey sakligu atlitini, grundgevingarnar og líkareglan við at útluta og knýta rættindi til persónar og feløg í einum býti millum bólkar av fiskiførum í kunngerð í 2012, sum ikki fylgdi bólkunum í lógini?
- Hvørjar vóru ítøkiligu heimildirnar, hvørji vóru tilmælini frá umsitingini, fylgdi landsstýrismaðurin fakligum tilmælum, ávaraði umsitingin landsstýrismannin – og um ikki, við hvørjari lógligari grundgeving og skjalfesting tók landsstýrismaðurin avgerð?
- Hví vórðu persónar og feløg viðgjørd so ymist í útlutingini av rættindum, hvør var lógarheimildin og fyrisitingarliga grundgevingin fyri hesum, og hvussu vórðu hesar týðandi avgerðir skjalfestar og viðgjørdar í fyrisitingini?

  Biðið verður um, at niðurstøða verður gjørd um hetta og latin Løgtinginum og almannakunngjørd innan 1. desember 2022.

Í hesum trimum pørtum, er talan um tríggjar ymiskar lógir: Lógin um vinnuligan fiskiskap, sjófeingislógin frá 2018 til 2020 og sjófeingislógin frá 2020, sum er enn er galdandi við ymsum broytingum.

Í 2010 er fyrsta árið, at nýtt makreltilfeingi verður útlutað. Í 2011 verður ein øðrvísi fyribils skipan gjørd, har eisini kunngerð verður nýtt. Og í 2012 verður eitt býti millum skipabólkar og rættindahavarar gjørt í kunngerð, sum Løgtingsins Umboðsmaður hevur gjørt frágreiðing um.

Kanningarstjórin skal innsavna, nýta og gera metingar um alt viðkomandi tilfar, og skal annars fáa atgongd til øll neyðug skjøl frá fyrisiting, myndugleikum og einskildum borgarum. Kanningarstjórin skal eisini biðja um munnligar og skrivligar frágreiðingar frá viðkomandi politikarum og fólki í fyrisitingini og myndugleikum, umframt viðkomandi einskildum borgarum ella løgfrøðiligum persónum, ið eru partar av ella kunnu lýsa fyrisitingina og lógargrundarlagið.

Biðið verður um, at kanningarstjórin, ið settur verður, er so óheftur og leysur av allari fyrisiting og einskildum pørtum og áhugamálum, sum gjørligt.

Biðið verður um, at kannað verður eisini í Norðurlondum og aðrastaðni – t.d. hjá óheftum stovnum – um kanningarstjóri kann setast, ið hevur royndir og innlit við fyrisitingarrætti og landsstýrismannaábyrgd at lýsa, kanna og gera niðurstøður um mál av slíkum slag, sum omanfyri eru nevnd.

Á løgtingi, 21. oktober 2021

Høgni Hoydal
Aksel V. Johannesen
Ruth Vang
Sirið Stenberg
Hendrik Old
Hervør Pálsdóttir
Páll á Reynatúgvu
Bjarni Hammer
Bjørt Samuelsen
Beinta Løwe Jacobsen
Ingilín D. Strøm
Bjarni Kárason Petersen
Djóni Nolsøe Joensen
Eyðgunn Samuelsen
Jóhannis Joensen